## Hedvig framsýning á Jinx

Allan juni mánað hevur føroyska listakvinnan Hedvig Johansdóttir framsýning á Gallerí Jinx í Havn.

Málningarnir, sum Hedvig hevur við á framsýningini, eru gjørdir á lørriti og stálplátum, og til hesar málningar hevur Hedvig nýtt akrylmáling, koltekningar/kollagir og tekst. Koltekningarnar hjá Hedvig hava fingið sín íblástur í filminum The Passion of the Christ.

**tn**

## Tyrla eftir skaddum manni

Seinnapartin mánadagin fekk MRCC støðin fráboðan frá Dragasundi um, at skipið hevði ein skaddan mann umborð.

Tá var Dragastund staddur einar 50 fjórðingar eystur úr Fugloynni. Neyðugt var at fáa mannin undir læknahond, og bjargingartyrlan hjá Atlantsflog var tí send úr Vágum at flyta mannin á Landssjúkrahúsið. Tað gekk bert hálvurannar tími frá tí, at tyrlan fór úr Vágum, til hon lendi við Landssjúkrahúsið.

**tn**

## Nógvur seyður á vegnum

Hetta er tíðin tá seyðurin vanliga er farin av bønum og niðan í hæddirnar. Men høgættin og kuldin, sum liggur um landið, ger at eingin gróður er í erva og seyðurin vil tíðskil illa niðan frá. Hetta ger at nógvur seyður er við vegjaðaran.

Serliga smálombini duga illa at ansa sær, og eru tí vandamikil í ferðsluni, vandi er fyri bæði fólki og fæi, tí heitir bóndafelagið nú á bilførarar um at koyra varliga.

Bóndafelagið sigur í tíðindaskrivi, at tað er ein stórur fíggjarligur smeitur hjá bóndum at missa seyð. Nógv vólk vita ikki av, at ábyrgdartryggingin tekur við, tá ein koyrir seyð yvir. Tí halda tey sær aftur við at melda óhappið. Tí tey eru bangin fyri bonustapi. Men slíkt ávirkar ikki bonusið. Tí heitur bóndafelagið á óhepnu bilførararnar, um at boða tryggingini frá, so bóndin kann fáa sítt endurgjald.

**nud**

# Edmund við í LiveContest 2005




*Super Sonic við fyrrverandi Chase-sangaranum Edmund Jacobsen skal taka lut í LiveContest 2005.*

*mynd: www.super-sonic.dk*

**Danski Bólkurin Super Sonic, har ið fyrrverandi Chase-sangarin Edmund Jacobsen eisini er við, er útvaldur til kappingina LiveContest 2005**

TÓNLEIKUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ikki færri enn 300 bólkur royndu at sleppa gjøgnum nálareyga, men tað eydnaðist bert 92 at sleppa víðari, og ein av teimum bólkunum var altso Super Sonic við Edmund Jacobsen.

Kappingin byrjar 1. september og heldur fram til stóru finaluna, sum verður í kenda spælistaðnum Store Vega, Keypmannahavn, tann 21. oktobur.

- Vit eru sera fegnir um at fáa ein slíkan møguleika. Bólkar sum Super Sonic, ið spæla harðan rock, hava sjáldan somu kor sum teir, ið spæla bleytari tónleik. Men LiveContest gevur okkum møguleika at spæla okkara egna tónleik fyri enn fleiri áhoyrarum enn vanligt, sigur Edmund Jacobsen.

Hann leggur afturat, at Super Sonic arbeiðir í løtuni við at fáa ein túr til Føroya í lag, og teir vóna, at meiri verður at frætta um hesar ætlanir í næstum.

Super Sonic útgav stakfløguna "Onetwothreefour" beint áðrenn jól 2004, og hendan er at fá kring alt landið.

Annars ber til at lesa meira um bólkin á www.super-sonic.dk.

**tn**

# Ættarstevna hjá Símuni og Jacobinu

TÍÐINDASKRIV

Boða verður frá ættarstevnu hjá Símuni og Jacobinu Hansen, á Koltursmýruni, í Skopun. Ættarstevnan verður hildin í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun vikuskiftið 23. og 24. juli. Øll sum kenna seg í slekt niður frá Símuni og Jacobinu Hansen, á Koltursmýruni, eru vælkomin at tekna seg til stevnuna.

**Ættin eftir Símun og Jacobinu Hansen er:**

1. Elisa Hansen, Skopun
2. Súsanna Katrina Hansen, Skopun
3. Suffía Hansen, Skopun
4. Óla Jacob Hansen, Skopun
5. Jóan Hendrik Hansen, Skopun
6. Wenningsted Hansen, Skopun
7. Óla Christian Hansen, Skopun

Kostnaður fyri ættarstevnuna er:

| | |
|---|---|
| Vaksin | 250,00 kr |
| Børn 7 - 16 ár | 100,00 kr |
| Børn 0 - 6 ár | Ókeypis |

Tekningin fer fram við at flyta luttakaragjald á kontu: ÆTTARSTEVNA 2005 nr. 6460- 1701799 í Føroya banka

Seinasta freist at tekna seg er 20.06.2005

Minnist til at upplýsa navn og aldur á øllum luttakarum saman við flytingini.

Á ættarstevnuni verður eitt nú skipað fyri gongutúri, bátatúrum, framsýning av myndum og nógv annað. Eisini verður bæði møti og gudstænasta á skránni sunnudagin, stendur í skránni fyri stevnuna.

# Tiltanic Impro Theater í Sjónleikarhúsinum

Í hesum døgum hava Sjónleikarhúsið og MáF forvitnisliga vitjan av Tiltanic, sum er ein sjónleikarbólkur úr Sveis, ið spælir eitt serligt slag av sjónleiki, ið kallast „teatersport".

Hetta er fyrstu ferð at slík framførsla er í Føroyum. Teatersport er eitt slag av ítrótti, tvey lið spæla upp í móti hvørjum øðrum, og annað liðið vinnur ella tapur.

Tað ber ikki til at siga, hvussu sjónleikurin eitur, hvat hann handlar um ella hvussu langur hann er, - tí í „teatersport" er onki avgjørt frammanundan. Tað, sum hendir á pallinum, verður improviserað ella funnið uppá, akkurát í tí løtu leikur fer fram.

Í „teatersport" hevur áskoðarin ein týðandi leiklut, áskoðararnir skulu avgera, hvat leikur skal verða um, t.d. geva leikarunum eitt orð, eitt hugtak, eina hending, og leikarnir skulu lofta orðinum og spæla ein leik, sum handlar um tað.

Bæði liðini spæla út frá sama orði ella hugtaki, og skal áskoðarin avgera, hvat lið hann heldur bestu framførslu.

Meðan spælt verður, skal áskoðarin, akkurát sum í fótbóltsdysti, annaðhvørt vísa sína gleði, ella sína ónøgd.

Í Europa er „Teatersportur" ein væl umtóktur sjónleikaraformur. Kappast verður millum býir, og millum lond. Tiltanic hevur vunnið fleiri av hesum kappingum.

11 sjónleikarar/tónleikarar eru við í Tiltanic. Nakrir føroyskir sjónleikarar koma eisini at luttaka á pallinum saman við Tiltanic.

Framførslur verða í Sjónleikarhúsinum hósdagin 9. juni kl. 20 og í Virkinum á Sandi fríggjakvøldið 10. juni kl. 20.

Atgongumerki fáast á Kunningarstovunum í Havn og á Sandi.